# Forvitnisligur sjónleikur í Norðurlandahúsinum

**Eini 85 fólk úr Danmark, Norra, Hetlandi og Føroyum leggja í løtuni seinastu hond á sjónleikin »Havet & Menneskene«, ið verður sýndur í Norðurlandahúsinum í kvøld**

SJÓNLEIKUR

*Lív Højsted Horsdal*
*horsdal@sosialurin.fo*

Í kvøld verður sjónleikur við dansi og tónleiki, ið snýr um felags søgu, mentan og lívskor, sýndur í Norðurlandahúsinum.

– Sjónleikurin er bygdur á søgu, sum Danmark, Norra, Hetland og Føroyar hava til felags. Eitt nú hava vit hav, vind, fisk, fátækdømi og trúgv til felags, sigur Gunnhild Brethvad, listarligur samskipari.

Sjónleikurin gongur fyri seg umborð á Norrønu og flytur seg við ferðaleiðini hjá Norrønu. Sjónleikurin byrjar sostatt í Danmark, ferðast síðan til Norra, Hetland og endar í Føroyum.

Talan er um eitt samstarv millum Danmark, Norra, Hetland og Føroyar. Londini hava øll hvør í sínum lag vant leikin, meðan Gunnhild Brethvad hevur ferðast ímillum londini seinastu tríggjar mánaðarnar og stílað fyri. Allir luttakararnir í leikinum, uttan teir føroysku, hittust fyri fyrstu ferð umborð á Norrønu á veg til Føroya. Tey royndu at venja eitt sindur umborð á Norrønu, men tað gekk ikki eftir vild, tí tað rullaði so illa. Ferðalagið kom til Føroya við Norrønu mánamorgunin og hevur síðan tá arbeitt dúgliga og sett leikin saman í Norðurlandahúsinum.

Føroyska partin av leikinum stíla næmingarnir á Dramaverkstaðnum fyri.

Atgongumerki fáast ókeypis í Norðurlandahúsinum og Kunningarstovuni í Havn og í Runavík. Sýningin byrjar klokkan 19.30. í kvøld og verður í stóra salinum í Norðurlandahúsinum. Tað er felagið Westling, ið saman við øðrum stuðlar leikinum.



*– Her leggja dansararnir seinastu hond á verkið. Á myndini síggja vit tríggjar útlærdar dansarar: Christina Straby Brethvad, Johanne Dam og Cecilie Gry Jensen*



*– Í leikinum hoyra vit mest um ein kvinnuligan kapteyn og ein forelskaðan stýrimann. Men somuleiðis eru vættrar, havfrýr, huldufólk og sjórænarar við í leikinum*

KAUPTHING
Virðisbrævameklarafelag



Vika 21 2006

# Partabrøv hildu á at lækka

MARKNAÐARRÁK

Farnu vikuna hildu partabrøv um allan heim á at lækka. Evropisk partabrøv lækkaðu sum heild um 6%, amerikonsk 3% og tey í Fjareystri 4%. Síðan 8. mai eru partabrøv um allan heim sum heild lækkað um 7%. Tey vóru tó hækkað sera nógv til tá, og samlað sæð er talan um eina hækking á alheims partabrøvum á 4% higartil í ár. Í morgun (23. mai) byrja partabrævamarknaðirnir á okkara leiðum við hækkingum. Norrøna vísitalið er í pluss við 1,8%, Danmørk við 1,5% og Evropa við 1%. Hetta er eitt gott tekin, hóast tað enn er ov tíðliga at siga, um lækkingin er endað á hesum sinni.

### Lánsbrøv byrjað at hækka

Í farnu viku byrjaði tann rentulækkingin, vit hava skrivað um allan hendan mánaðin. Danska 10-ára rentan er lækkað úr 4,15% í nú 3,97%. Útlit eru fyri, at hon kann lækka til 3,80% í fyrstu atløgu. Sostatt er kursvinningur í eygsjón fyri lánsbrævaeigarar komandi vikuna ella tvær.

### Fylg við partabrøvum

Sum nevnt omanfyri eru alheims partabrøv lækkaði í miðal 7% seinastu tvær vikurnar. Higartil sær út til, at talan er um eina stutttíðar lækking, sum ikki broytir langtíðar útlitini. Men enn er ov tíðliga at siga, at vent er. Tó eiga eyguni at verða havd við, um partabrævamarknaðirnir fara at vísa bjartari gongd hesa vikuna.

### Hesa vikuna

Av tí at partabrøv eru lækkað so skjótt, verður hendan vikan merkt av, um lækkingin man fara at enda nú. Miðbankarnir elvdu til, at partabrøvini byrjaðu at lækka, og tí verður dentur hesa vikuna lagdur á prísvakstrartøl báðu megin Atlantshavið, umframt oljuprísin.

Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin
-har tað hendir